# Miðbýarfelag hevur mótasýning

**Á hvørjum ári hesa tíðina skipar Miðbýarfelagið í Havn fyri mótasýning. Í fjør varð hetta hildið á Hvonn, men í ár er tað á Rex**

TILTAK
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Mótasýningin er fyri handlar í miðbýnum í Havn. Áðrenn sjálv mótasýningin, sum verður í annaðkvøld frá klokkan 20, byrjar, upptraðka nakrar dansigentur, sum eru í klæðum frá Sirri og hava fingið gjørt hár frá Royal, siga fyrireikararnir.

Tá mótasýningin er komin í helvt verður steðgur, har Uni Debes kemur at spæla nøkur løg. Sagt verður, at mótasýningin hesaferð er eitt sindur øðrvísi við øðrvísi modellum.

Ein ferðaseðil frá Atlantsflog verður lutaður burtur, og aðrir góðir vinningar verða eisini í sambandi við lutaseðlasølu. Eisini verður okkurt at fáa til matna.

Atgongumerki til mótasýningina í Rex, sum byrjar klokkan 20 hóskvøldið 8. november, fáast á Kunningarstovuni í Havn.



*Frá mótasýningini hjá Miðbýarfelagnum í Havn í fjør*
*Savnsmyndir: Jens Kristian Vang*




**SKIPARAR**

Um tú hevur siglt og kundi hugsa tær eitt leiðandi starv á sjónum, so kann Klaksvíkar Sjómansskúli bjóða útbúgving til skipara.
Útbúgvingin gevur rætt til at vera stýrimaður og skipari á øllum støddum av fiskiskipum. Eisini gevur skiparaprógv rætt til at vera stýrimaður ella skipari á handilsskipum upp til 3000 BT.

Lesnaðurin tekur 1½ ár og byrjar 7. januar 2008

Klaksvíkar Sjómansskúli
Garðavegur 11
FO - 700 Klaksvík
Tlf. + 298 45 61 28
fax. + 298 45 79 17
t-post : klaknav@klaknav.fo



**DUGNASKAPRROYND**

Um hugurin stendur til sjógvin er ein góð byrjan at fara í sjóvinnuflokkin. Her verður givin frálæra í sjómansskapi, eins og høvi er at taka dugnaskaparroynd í sigling, sum gevur rætt til at føra skip upp til 100 BT í strandasigling, Umframt hetta telur sjóvinuflokkurin við í siglingstíðini, um ein ætlar sær víðari til skipara.

Lesnaðurin tekur ½ ár og byrjar 7. januar 2008

Klaksvíkar Sjómansskúli
Garðavegur 11
FO - 700 Klaksvík
Tlf. + 298 45 61 28
fax. + 298 45 79 17
t-post : klaknav@klaknav.fo



**SKIPSKOKKAR**

Grundskeið í skipkokkayrkinum gevur øktan førleika at virka sum kokkur á skipum. Eingin upptøkutreyt er fyri at byrja í kokkaflokkinum. Kokkaútbúgvingin tekur 20 vikur og endar við próvtøku.
Útbúgvingin leggur umframt matgerð m.a. dent á heilsuviðurskiftini umborð á skipum, føðslulæru og reinføri, og at proviantera.

Lesnaðurin tekur ½ ár og byrjar 7. januar 2008

Klaksvíkar Sjómansskúli
Garðavegur 11
FO - 700 Klaksvík
Tlf. + 298 45 61 28
fax. + 298 45 79 17
t-post : klaknav@klaknav.fo